



*Steypið sum kappast verður um.*
*Hetland og Føroyar hava ikki kappast síðan 1994*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Hetland vann 114 - 102 samanlagt*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hetlendingarnir vóru stinnari

**SKJÓTING** Hetland vann landsdystin móti Føroyum í skjóting um vikuskiftið

Uni Holm Johannesen

Hetlendingar eru stinnari enn føroyingar í skjóting.

Tað varð prógvað í tveimum skjótikappingum, sum Skjótisambandið hevði tikið stig til um vikuskiftið.

John M. Laurenson og Ross Work, úr Hetlandi, vitjaðu í Føroyum og royndu seg móti føroyingum í Skeet og Trap. Samlaða úrslitið var, at Hetland vann 114-102.

Tað varð lagt til brots leygarmorgunin, tá 9 luttakarar vóru í Skeet-kappingini á breytini hjá Sunda Byrsufelag á Norðskála.

Seinnapartin leygardagin vóru 12 luttakarar í Trap-kappingini á breytini hjá Byrsumálum í Sandvíkum.

Johnhard Klettheyggj, ein av føroysku skjúttunum, vísir á, at landsdysturin eydnaðist væl.

– Tú kann ikki beinleiðis siga, at føroyska landsliðið kappaðist móti hetlendingunum. Men vit vóru fleiri skjúttar, og hóast vit raktu ikki serliga væl, tí vindurin darvaði, so eydnaðist tiltakið væl, sigur Jonhard Klettheyggj.

Landsdysturin var hin fimti millum Føroyar og Hetland í skjóting. Í 1989, 1990 og 1993 vunnu hetlendingar, og føroyingar vunnu í 1994.

Tað hevur verið lítið virksemi í føroyskari skjóting seinastu 15 árini, og tí hevur ikki verið dystast um skjøldrið, sum John M. Laurenson og Ross Work hava við sær í viðførinum til Hetlands.

Skjøldrið hevur verið í Føroyum síðan dystin í 1994.

uni@sosialurin.fo

## Úrslitini í skeet

*Einstaki luttakarin skeyt eftir 75 dúgvum*

1. Jóannis Joensen, Føroyar, 61 dúgvur
2. John M. Laurenson, Hetland, 58 dúgvur
3. Sámal Debes, Føroyar, 53 dúgvur
4. Magni Dam, Føroyar
5. Johnhard Klettheyggj, Føroyar
6. Jónstein Petersen, Føroyar
7. Ragnar við Streym, Føroyar
8. Hávarður Fjallstein, Føroyar
9. Ross Work, Hetland

## Úrslitini í trap

*Einstaki luttakarin skeyt eftir 75 dúgvum*

1. John M. Laurenson, Hetland, 56 dúgvur
2. Esmar Simonsen, Føroyar, 41 dúgvur
3. Ross Work, Hetland, 40
4. Eirikur Elisson, Føroyar
5. Regin Enghamar, Føroyar
6. Finn Ludvig, Føroyar
7. Sámal Debes, Føroyar
8. Johnhard Klettheyggj, Føroyar
9. Jóannis Joensen, Føroyar
10. Magni Dam, Føroyar
11. Ragnar við Streym, Føroyar
12. Simme A. Jacobsen, Føroyar

*Bestu úrslitini í skeet og trap verða løgd saman fyri at finna samlaða vinnaran.*
***Hetland vann 114 – 102 samanlagt.***